

Edmund Joensen
*løgtings- og fólkatingsmaður*

## Semja á Christiansborg:

# Bert ein grundlóg í Ríkisfelagsskapinum

Í Fólkatinginum er breið semja um, at í Ríkisfelagsskapinum er bert møguligt at hava Ríkisgrundlógina, ið fevnir um øll trý londini í felagsskapinum.

Endaorðaskiftið í Fólkatinginum mikukvøldið vísir, at breið semja er á Christiansborg um, at tað er bert møguligt at hava ta einu grundlógina í Ríkisfelagsskapinum, nevniliga Ríkisgrundlógina frá 1953.

Í lívliga orðaskiftinum um Ríkisfelagsskapin og Føroyar ljóðaði ferð eftir ferð sjónarmiðið um, at í Ríkisfelagsskapinum hava vit eina felags grundlóg, og hon er galdandi fyri øll trý londini í felagsskapinum.

Orðaskiftið kom í lag, nú eitt uppskot til grundlóg fyri Føroyar liggur í Løgtinginum.

– Føroyar kunnu til eina og hvørja tíð gerast sjálvstøðugar og loysa frá Danmark. Men tá avgerðin skal takast, eigur hon at koma inn gjøgnum høvuðsdyrnar og ikki gjøgnum bakdyrnar, so sum vit hava lyndi til at síggja í hesum døgum í Føroyum, segði Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, í orðaskiftinum.

Edmund Joensen, fólkatingsmaður Sambandsflokksins, sum var partur av lívliga orðaskiftinum mikukvøldið, hevur leingi ført fram sama grundsjónarmið:

– Heilt frá byrjan havi eg greitt júst frá hesum grundleggjandi, at um grundlógaruppskotið verður samtykt, hava Føroyar eina sera stóran trupulleika. Tá er í ringasta føri talan um regulera loysing, og tá er sannlíkt, at vit í Føroyum kunnu missa ríkisborgararættindini. Hetta er sera álvarsligt, sigur hann.

Longu tann 15. juni er grundlógaruppskotið í Føroyum aftur til viðgerðar á Christiansborg. Tá hevur Føroyanevndin kallað Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharra, í samráð um, hvørja støðu ríkisstjórnin hevur til uppskotið.

– Sum formaður í nevndini havi eg tryggjað, at talan verður um opið samráð, har áhoyrar og fjølmiðlar hava atgongd, og áhugað kunnu fylgja við beinleiðis á internetinum, sigur Edmund Joensen, fólkatingsmaður og formaður í Føroyanevnd Fólkatingsins.

***Í Fólkatinginum er breið semja um, at í Ríkisfelagsskapinum er bert møguligt at hava Ríkisgrundlógina, ið fevnir um øll trý londini í felagsskapinum***



Jákup Danielsen

# Er Posta á deyðastrá?

Tríggjar dagar tók tað. Inn um hurðina kom bræv dagfest 31. mai 2010, sum var okkum í hendi 3. juni 2010. Brævið var frá Posta. Á gløttum pappíri fáa vit nú at vita, at tænastan at flyta brøv millum avsendara og móttakara gerst verri.

Tá Posta bleiv lagt um til partafelag kom postur seks ferðir um vikuna, síðani fimm og nú tríggjar ferðir.

Løgmaður segði í røðu sínari til løgtingið á ólavssøku 2000, at Postverk Føroya hevur ikki kunna fylgt við teimum broytingum, sum eru hendar á postverksøkinum í øðrum londum, og stovnurin hevur støðugt havt truplari við at nøkta tey krøv, ið verða sett einum nútímans postverki. Arbeitt verður við at gera løgtingslóg um postvirksemi, og at umskipa Postverk Føroya til eitt partafelag eftir nøkrum árum.

Nøkur ár seinni varð so Postverkið lagt í alment partafelag. Vónirnar til, at Postverkið kundi leggja eina nýggja lívsleið vóru stórar. Postverkið var longu komið undir ávíst trýst av øðrum miðlum at flyta post við, men møguleikarnir vóru nú at fremja aðrar ætlanir, til tess at Postverkinum kundi verða lív lagað.

Onkursvegna missa nevnd og leiðsla fullkomiliga tamarhaldið á støðuni. Farið verður í holtur við at »rudda« upp og út fyrilitaleyst, so at tey missa úr eygsjón málsetningin um at fáa eitt nýtímans postverk.

Takstirnir verða settir upp, posthús verða niðurløgd, útberingin verður óskipað og oman á alt hetta hetta verða so royndu postarbeiðarnir gjørdir arbeiðsleysir við ella uttan teirra vilja.

Kampurin móti reyðum tølum tykist vera málsetningin, ikki at nútímans gera tað.

Tíðin er komin. Annaðhvørt fáa vit eitt nýtt bræv sum sigur, at partafelagsgerðin av Postverki Føroya er miseyðnað, og lykilin snaraður um, ella eiga nevnd og leiðsla at taka avleiðingarnar.

***Onkursvegna missa nevnd og leiðsla fullkomiliga tamarhaldið á støðuni***



Bjørn Kalsø

# KT-skipan hjá bankum - lóg um persónsupplýsingar

Í fyrispurningi samb § 52 a í tingskipanini spyr Bjørn Kalsø, løgtingsmaður Anniku Olsen, landsstýriskvinnu, um flutningur av upplýsingum hjá kundum um peningaviðurskifti, fer fram samb. lóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýriskvinnan kannað, hvørt trygdarskipanir í nýggju KT-skipanini hjá føroysku peningastovnunum frá útlendskum veitara kunnu tryggja, at lóg um viðgerð av persónsupplýsingum verður fylgd, tá upplýsingar um peningaviðurskifti hjá kundum verða fluttir umvegis nýggju skipanina?
2. Er í hesum sambandi gjørd nøkur niðurstøða spurninginum viðvíkjandi?

***Tað er sera umráðandi, at krøv verða sett KT-skipanini***

**Viðmerkingar:**

Síðan føroysku peningastovnarnir fingu nýggja KT-skipan frá útlendskum veitara, hava Felagið Peningastovnar og leiðslurnar í bankunum, í fleiri umførum verið í fjølmiðlunum við umberingum um veikleikar við nýggju skipanini.

Ørkymlan hevur eisini verið skipanini viðvíkjandi millum kundar.

Hóast ørkymlan millum kundar og umberingar frá bankunum, mæla Felagið Peningastovnar og leiðslurnar í bankunum kundunum til at vísa tolsemi. Talan er, samb. teimum, einans um sonevndar barnasjúkur, sum annaðhvørt longu eru, - ella rímiliga skjótt verða fingnar av vegnum. Frammanfyrinevndu meta somuleiðis, at skipanin grundleggjandi er í lagi, tá talan er um dygd og trygd.

Komið er fram, at kundar hava fingið innlit í konti ella upplýsingar, teir av røttum ikki áttu at fingið innlit í. Somuleiðis hevur P-tal staðið á kvittanum hjá einstøkum sjálvtøkukundum.

Upplýsingar um peningaviðurskifti hjá privat- og vinnukundum eru umfatað av lóg um viðgerð av persónsupplýsingum, tá hesir verða fluttir annaðhvørt innanlands ella millum lond umvegis KT-skipanir, sum peningastovnarnir vara av.

Tað er í hesum sambandi sera umráðandi, at krøv verða sett KT- skipanini, sum gera, at lóg um viðgerð av persónsupplýsningum verður fylgd, tá upplýsingar um peningaviðurskifti ferðast á alnótini umvegis skipanina. Tí hesir spurningar til landsstýriskvinnuna.